

www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 01 - 2013

# Ósemja um oljuleiting við Jan Mayen

Norski oljumálaráðharrin er ósamdur við norska veðurlags- og dálkingarstýrið, sum mælir frá at lata økini við Jan Mayen upp fyri leiting. Ola Borton Moe sigur við aftenbladet.no, at stjórnin ætlar sær at halda fram við fyrireikingunum at bjóða út øki við Jan Mayen til oljuleiting, hóast veðurlagsstýrið mælir frá við teirri grundgeving, at váðin er ov stórur at fara undir oljuvirksemi í hesum økinum. Ætlanin hjá stjórnini er at lata upp eitt 100.000 kvm stórt øki. Eisini stýrið fyri náttúruumsiting heldur tað vera skeivt at fara undir oljuvirksemi við Jan Mayen, tí tað metir, at alt økið eigur at verða friðað. Ola Borten Moe sigur eini viðmerking til hoyringssvarini frá teimum báðum stýrunum, at tey hava ikki vetorætt og kunnu tískil ikki steðga ætlanini hjá stjórnini at bjóða økini við Jan Mayen út til leiting. Nils Harley Boisen, ráðgevi fyri Arktis og norðurøkini í World Wildlife Foundation í Norra sigur, at hoyringstilgongdin hevur verið alt ov stutt. Ætlaninar hjá stjórnini at bjóða nýggj øki í Arktis út til oljuleiting hava als ikki tikið hædd fyri ráðunum frá umhvørvismyndugleikum og síggja eftir øllum at døma heilt burtur frá altjóða hendingum og úttalilsum í nýggjari tíð, sum seta stór spurnartekin við norsku olju- og gassvíðkanina til arktisk øki, sigur Boisen. Seinasta hendingin í Alaska, har eitt av boriskipunum hjá Shell fór á land, er eitt dømi um, at umstøðurnar í Arktis loyva ikki oljuvirksemi, og hetta eiga norskir myndugleikar eisini at taka hædd fyri, leggur hann aftrat.